# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 63/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**(Skattafrítt upp til 150.000 kr. at langtíðar útleiga bústaðir)

Kristina Háfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt málið fram 2. november 2018, og eftir 1. viðgerð 20. november er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 23., 27., 28. og 29. november og 10. desember.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við S/pf Mark, Felagið fyri Peningastovnar og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Nevndin tekur undir við, at árliga hámarkið fyri at leiga út skattafrítt verður hækkað. Málið er, at tað skal gerast meira áhugavert hjá húsaeigarum at leiga út hús ella íbúðir, sum standa tóm/tómar, soleiðis at útboðið av tøkum leigubústøðum verður størri. Nevndin heldur, at hetta er eitt átak, sum kann bøta um stóra bústaðatrotið, vit hava í løtuni.

Hinvegin sær nevndin fyri sær, at hækkaða skattafría markið eisini kann hava við sær, at munandi fleiri bústaðir verða keyptir við útleigan fyri eyga. Avleiðingin verður øktur eftirspurningur og enn hægri sethúsaprísir. Hendan møguliga gongdin tænir ikki teimum, sum frammanundan hava trupult við at fáa føtur undir egið borð. Tí heldur nevndin, at skattafría markið í fyrsta umfari bert eigur at verða hækkað til kr. 100.000, og at tað í fyrsta umfari skal vera galdandi í 3 ár. Nevndin heldur, at tað, áðrenn 3 ár eru farin, skal metast um, hvørt broytingin livir upp til sítt endamál og um, hvørt jaliga ávirkanin vigar upp ímóti møguligum neiligum fylgjum av broytingini.

Nevndin setir tí fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1 verður “150.000” broytt til: “100.000”.

Við hesum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

**Fíggjarnevndin, 11. desember 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Ruth Vang<br>formaður | Bárður á Steig Nielsen<br>næstformaður | Helena Dam á Neystabø |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |